# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Yvirlækni til Skurðdepilin (avloysari)

Á skurðdeplinum er eitt avloysarastarv í almennari kirurgi leyst at søkja til setan skjótast gjørligt og fram til 1. januar 2009. Yvirlæknin, sum er í farloyvi og sum tú skalt avloysa, er serlækni í plastikkirurgi, ið eisini fevnir um bróstkirurgi og bróstkrabbakirurgi. Tað er ein fyrimunur, men ikki eitt krav, at tú fevnir um øll økini. Tað hevur stóran týdning, at tú kanst arbeiða í einum almennum kirurgiskum bakvaktstoymi, sum er 3 skift. Forvaktstoymi er eitt 7 skiftis hjálparlæknatoymi.

Skurðdepilin fevnir, umframt almenkirurgi við urologi, gastrokirurgi og plastikkirurgi, eisini um sergreinarnar ortopedkirurgi, gynekologi, obstretik, ONH, eygna- og odontologi.

Her starvast í alt 12 yvirlæknar. Vaktarbyrðan er sámulig.

Vit vænta, at tú er samstarvshugað/ur og dámar avbjóðingar.

Lønin er í samráð við FAS og Fíggjarmálaráðið frá 19. september 2005.

Um tú vil vita meira um starvið, kanst tú seta teg í samband við leiðandi yvirlækna Jákup Midjord á tlf. 304599, lok. 5100 ella t-post lsjakmi@ls.fo

**Umsóknarfreistin** er 15. januar 2008

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Barnadeildina B5

Á Barnadeildini eru tvey avloysarastørv á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum leys at søkja til setan:

- 1. mars 2008 ella eftir avtalu til og við 1. februar 2009
- 1. mai 2008 ella eftir avtalu til og við 31. desember 2008

Barnadeildin hevur pláss fyri 7 børnum í aldrinum 0 – 14 ár.

Deildin er júst umvæld og pláss er til barnaambulatorium.

Deildin er byrjað við THS (Talgild Heilsu Skipan).

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til børn í aldrinum 0 - 14 ár

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur við nógvum avbjóðingum

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan røkt og viðgerð av børnum

**Nærri fæst at vita** frá Tove Thomsen, deildarleiðara á B5, tlf. 304500, lokal 6055 ella frá Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin** er 7. januar 2008 kl. 12.00

## Reingerðarfólk til Reingerðardeildina

Til Barnadeildina verður søkt eftir reingerðarfólki á starvsbrøki 0,5916 í skiftandi vaktum til setan 1. januar 2008. Talan er um fast starv.

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Alvildu Samuelsen, deildarleiðara, lokal 1243.

**Umsóknarfreistin**: 28. desember 2007 kl. 12.00

## Starvsfólk til Køkin

Í Køkinum eru trý avloysarastørv leys at søkja til setan skjótast gjørligt. Talan kann verða um økonomaassistent, føðsluatstøðara, kokk ella smyrjibreyðsjomfrú.

- 2 fulltíðarstørv til og við 31. juli 2008
- 1 hálvtíðarstarv til og við 15. september 2008

**Førleikakrøv:**
- útbúgving innan eina av omanfyri nevndu starvsgreinum
- áhugi og fleksibilitetur í mun til uppgávurnar
- fakligur dugnaskapur
- samstarvsvilji
- sjálvstøðugleiki
- ábyrgdarkensla

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi arbeiði
- eitt arbeiðspláss í menning
- at arbeiða saman við góðum og dugnaligum starvsfeløgum

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Karl J. Granz, lokal 1260, teldupostur: lskargr@ls.fo

**Umsóknarfreistin** er 31. desember 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B7

Vit søkja eftir 4 sjúkrarøktarfrøðingum til føst fulltíðarstørv á B7 í skiftandi vaktum til setan 1. februar 2008 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki.

B7 er ein medisinsk deild, sum er nýumvæld. Sjúklingar og nøkur starvfólk frá med. deild E3 flyta saman við B7 frá 1. februar 2008.

Ætlanin er at byrja B7 1. februar 2008 við hesum sergreinum: Lungamedisin, nefrologi, hæmatologi, apoplexi, rheumatologi og onkologi.

Faklig menning við undirvísing og skeiðvirksemi innan serøkini byrjaði í vár og heldur fram.

B7 er eisini byrjað við tvørfakligari konferensu hvønn morgun.

Aðrar áhugaverdar avbjóðingar, sum liggja fyri framman, verður implementering av THS primo 2008.

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum:**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndun innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Jónu Augustinussen, deildarleiðara á B7, lokal 6067, lsjonau@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin** er 7. januar 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

· er sjúklingurin í miðdeplinum
· eru umleið 200 seingjarpláss
· eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
· eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
· eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
· er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo